*BP framleiðir olju við markið í 1996:*

# Stóran áhuga fyri føroyska økinum

*Ein av heimsins størstu fyritøkum, Brittish Petroleum, BP, hevur stóran áhuga fyri at leita eftir olju í føroyskum øki. Um eitt hálvt ár ella so fer fyritøkan undir fyrstu framleiðsluna nakrantíð vestan fyri Hetland, stutt frá markinum. Tom Fife, stjóri hevur vitjað saman við 4 øðrum serfrøðingum. Teir vóna, at marknaósemjan millum Føroyar og Bretland verður loyst skjótt, soleiðis at alt økið millum Føroyar og Hetland verður opið fyri oljufeløgini*

Í farnu viku vóru fimm umboð fyri stóra bretska oljufelagið BP í Føroyum.

Nú Skotland spældi landsdyst móti Føroyum á Svangaskarði, nýttu tey høvið at leggja ferðina til júst hetta mundið.

Teir fimm BP-menninir eru nakrir av oddamonnunum í milliardastóru verkætlanunum vestan fyri Hetland, har BP sum fyrsta oljufelag nakrantíð fer undir veruliga oljuframleiðslu í komandi ári. Talan er um stóra Foinavenfeltið, sum liggur nær føroyska markinum.

Undir vitjanini í Føroyum nýttu BP-fólkini høvi til at hitta umboð fyri myndugleikar og vinnulív, eitt nú borgarstjóran í Havn. Men mest týðandi parturin av vitjanini var at hitta umboð fyri føroysku oljufyrisitingina og oljuráðleggingarnevndina.

Fundurin varð hildin í nýggju hølunum á Debesartrøð.

**Góðan fund við føroyingar**

Tom Fife, sum stendur fyri verkætlanunum hjá BP vestan fyri Hetland sigur við Sosialin, at teir høvdu ein sera góðan fund við føroysku myndugleikarnar, har báðir partur fingu lagt fram síni sjónarmið og sett hvørjum øðrum spurningar.

Vit greiddu frá, hvussu langt vit eru komnir við ætlanum okkara vestan fyri Hetland, og hvørjar nýggjar ætlanir vit hava. Hinvegin fingu vit so eisini at vita, hvussu langt oljufyrisitingin er komin við sínum arbeiði.

Hetta var ein sera positivur fundur sigur Tom Fife, sum eisini sigur seg hava stóra virðing fyri føroyingunum, sum umsita olju- og undirgrundarspurningarnar.

BP er í løtuni í ferð við at gera klára fyrstu framleiðsluna frá eini oljukeldu vestan fyri Hetland. Teir rokna við, at fyrsta oljan kemur upp úr Foinaven keldini fyrst í komandi ári. Í byrjanini verður talan um einar 90.000 tunnur um dagin. Við víðari útbygging verður henda framleiðslan munandi økt.

Arbeitt verður so eisini við at gera Schiehallion feltið, ið liggur stutt frá Foinaven, klárt til framleiðslu.

Í summar fara teir at hava einar fýra boripallar á hesum báðum feltunum. Tveir aðrir boripallar skulu leita eftir olju í nýggjum økjum. Hvar tey eru vil BP ikki upplýsa, heldur ikki um hesi økini eru uppat føroyska markinum.

**Upp at markinum**

Í fjør gjørdi boripallurin Sonat Rather eitt fund úti á kantinum á Hetlandsrennuni á umleið 760 metra dýpi. Hetta fundið er tað teir á oljumálið kalla "a tight hole", sum merkir, at eingir upplýsingar koma út um hesa boring enn.

Skotsk bløð hava fyrr skrivað, at BP her hevur



*Teir fimm stjórarnir og serfrøðingarnir hjá BP eftir væleydnaðan fund við oljuráðleggingarnevndina, her uttan fyri "nýggju" hølini hjá oljufyrisitingini á Debesartrøð. Mynd jan*



*Petrojarl, sum varð bygdur sum hjálparskip hjá sovjettiska militerinum, verður nú longt á spanskari skipasmiðju og verður fyrsta framleiðandi skipanin vestan fyri Hetland*




*Hetta er skipaslagið, sum avloysir teir stóru og dýru oljupallarnar og helst verður framtíðar myndin millum Føroyar og Hetland*

